## Sat ósekur í fongsli

Í amerikanska statinum Texas hava myndugleikarnir latið tann 76 ára gamla Robert Coney leysan, tí tað vísti seg, at hann hevði sitið í fongsli í samfull 41 ár, hóast hann var ósekur.

David Wilson, sum er dómari í býnum Lufkin har eysturi í Texas, kom hósdagin til ta niðurstøðu, at Robert Coney var ósekur, tá hann bleiv dømdur. Tað var í 1962, og árið eftir fekk maðurin lívlanga fongsulsrevsing. Í úrskurði sínum segði David Wilson, at løgreglan hevði noytt Robert Coney at játta seg sekan í einum vápnaðum innbroti, sjálvt um løgreglumenninir vistu, at hann var ósekur. Undir avhoyringunum høvdu løgreglumenninir verið so harðligir, at teir høvdu brotið aðra hondina á Robert Coney.

Tá hann slapp út úr fongslinum, segði Robert Coney, at sjálvandi var hann argur um tað, sum hent var, men at hann kortini ætlaði sær at royna at gloyma tað og at liva eitt vanligt lív.

## Hundar við myndatóli

Bretska løgreglan er nú farin at nýta servandar hundar sum upptøkumenn, tá leitað verður eftir yvirgangsmonnum.

Rock Harrison hjá løgregluni í London sigur við blaðið The Sun, at tá løgreglan fer inn í eini hús, sum yvirgangsmenn halda til í, vita løgreglumenninir ikki, um yvirgangsmenninir kunnu vera vápnaðir. Tí verður eitt myndatól sett oman á høvdið á einum hundi, og hann verður so sendur inn í húsini at vita, hvar yvirgangsmenninir eru, og um teir eru vápnaðir. Løgreglumenninir standa so uttanfyri og fylgja við, hvat sæst í myndatólinum.

Rick Harrison, sum sjálvur hevur tann tvey ára gamla myndahundin Max, sigur við The Sun, at tað nýggja vápnið ímóti yvirgangsmonnum hevur víst seg at virka sera væl, og hann ivast ikki í, at løgreglumenninir kunnu kenna seg nógv tryggari, hava teir Max ella ein annan myndahund við sær, tá teir fara at leita eftir yvirgangsmonnum.

## Illur hummari

Ein tíggju ára gomul norsk genta varð so illa bitin av einum hummara mikudagin, at læknin mátti nýta ellivu pentur fyri at fáa sárið at grógva aftur. Áðrenn læknin seymaði, fekk gentan sjey sproytur.

Dagsavisen skrivar, at Ann-Christine Hæggernæs spældi niðri í fjøruni í Hetlevik á oynni Askøy, tá hummarin brádliga beit hana í annan fótin. Hon sigur við blaðið, at hon visti ikki, hví hon fekk so ilt, men lítla løtu seinni sá hon ein hummara fara út eftir botninum. Tá hon tók fótin upp undan vatnskorpuni, sá hon, at hummarin hevði bitið hana báðu megin fótin.

Ann-Christine Hæggernæs fylti tíggju ár í gjár, so hesaferð noyyddist hon at halda føðingardagin á høkjum.

## Tann nakni sannleikin

Sjónvarpshyggjarar í Kanada, Bretlandi og Fraklandi kunnu nú fegnast um, at teir fáa tann nakna sannleikan at vita, tá teir hyggja eftir tíðindum í sjónvarpinum.

Í 1999 byrjaði sjónvarpið Naked News (Nakin tíðindi) at senda í Kanada. Tað serliga við hesum tíðindasendingunum er, at upplesarin, sum altíð er ein kvinna, letur seg úr klæðunum, meðan hon lesur tíðindini. Eitt plagg fyri og annað eftir endar á gólvinum, og tíðin er lagað soleiðis, at tá sjónvarpskvinnan kemur til veðurtíðindini, rýkur tað seinasta plaggið av henni. Samantha Page, sum er ein av upplesarunum, sigur tó við Reuter, at hon og hinir upplesararnir royna at halda seg í skinninum, tá tíðindini snúgva seg um onkran, sum er deyður, tí tað hevði verið ósømiligt at lisið slíkt nakin, heldur hon.

Í Evropa eru tað bara bretar og fransmenn, sum síggja Naked News, sum verða send á Sky TV í Bretlandi.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Castro fekk Charley í føðingardagsgávu

**Fleiri hundraðtúsund kubanar máttu í gjár flýggja undan ódnini Charley, sum hevði beina kós ímóti Florida**

ÓDNARVEÐUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Kubanski leiðarin, Fidel Castro, fylti 78 í gjár, men hetta var ikki ein vanligur føðingardagur hjá honum. Ístaðin fyri at halda dagin fór hann á veðurstøðina í Havana at tosa við veðurmenninar har um ódnina Charley, sum var á veg ímóti høvuðsstaðnum.

Kubansku myndugleikarnir søgdu í gjár, at fleiri hundraðtúsund fólk vóru flýdd undan ódnarveðrinum. Har vesturi í landinum roknaðu myndugleikarnir við vatnflóð, og har vóru minst 149.000 fólk flýdd frá húsi og heimi.

Charley, sum er ein tropisk ódn, helt leiðina fram ímóti Florida. Eisini har høvdu fólk fyrireikað seg til ódnina, og sambært Jebb Bush, guvernøri, fór ódnin at raka øki, har meiri enn tvær milliónir fólk búgva. Beint frammanundan hevði tropiski stormurin Bonnie herjað partar av Florida.



*Hendan fylgisveinamyndin vísir tropisku ódnina Charley í neðra og tropiska stormin Bonnie í erva. Vanliga plaga tær tropisku ódnirnar at taka seg upp í juni, men Charley er tann fyrsta í summar. Hinvegin er tað sjáldsamt, at so stutt er ímillum ein tropiskan storm og eina tropiska ódn sum hesaferð*

# Bush og vinnulívið eru ov væl

**Líkt er til, at summar amerikanskar fyritøkur hava fingið fyrimunir í endurbyggingini í Irak, tí tær hava gott samband við Bush-stjórnina**

USA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tey, sum skipa fyri valstríðnum hjá John Kerry, halda seg hava funnið eitt nýtt vápn í royndunum at fella George W. Bush, forseta á valinum í november. Veljararnir skulu nú fáa at vita, hvussu tætt samband er ímillum stjórnina og summar amerikanskar fyritøkur, og at hesar fyritøkurnar hava fingið stórar fyrimunir, tá myndugleikarnir hava lutað arbeiði í Irak út.

Ted Devine, sum er í valbólkinum hjá Kerry, sigur við bretska blaðið The Financial Times, at sambandið ímillum stjórnina og fyritøkurnar verður eitt av teimum stóru evnunum í valstríðnum í heyst. Sjálvur ivast hann ikki í, at veljararnir verða í øðini, tá sannleikin kemur fram, og hann er eisini sannførdur um, at avdúkingarnar fara at koma forsetanum illa við.

### Halliburton

Tann fyritøkan, sum oftast hevur verið nevnd í sambandi við stjórnina, er Texas-fyritøkan Halliburton. Dick Cheney, varaforseti, var ein av stjórunum í fyritøkuni, áðrenn hann gjørdist varaforseti, og nógv bendir á, at tað er komið fyritøkuni væl við, at tann gamli stjórin fekk eitt so týðandi embæti.

Herfyri avdúkaði New York Times, at Halliburton hevði fingið arbeiði frá amerikonsku umsitingini í Irak fyri fleiri milliardir dollarar, sjálvt um eingir pengar vóru játtaðir til hesi arbeiði.

Samstundis kom fram, at ósemja hevur tikið seg upp ímillum herin og eitt dótturfelag hjá fyritøkuni, tí felagið hevur sent herinum rokningar fyri arbeiði, sum sambært herleiðsluni ikki eru gjørd.

Fyrr í vikuni fréttist eisini, at ein kelda í verjumálaráðnum Pentagon hevði latið leka út, at Halliburton kann ikki skjalprógva rokningar fyri næstan tvær milliardir dollarar. Tí hevur verjumálaráðið í fyrsta umfari gjørt av at afturhalda pengum, sum Halliburton sigur seg eiga, skrivar Financial Times.

Í síðstu viku søgdu fleiri kongresslimir við New York Times, at stjórnin hevur útlutað arbeiði í Irak fyri nógv meiri pengar enn tað, sum er játtað. Eisini tá bleiv Halliburton nevnd.

Ted Devine sigur við Financial Times, at nógvir amerikanarar halda sambandið ímillum stjórnina og Halliburton hava líka stóran týdning í valstríðnum sum spurningar um heilsu og arbeiðspláss. Tí kunnu slíkar avdúkingar fáa stóran týdning fyri valið í november, sigur hann.



# Seinasta royndin at bjarga lítla Peturi

**Hósdagin varð ein seinasta roynd gjørd at bjarga lítla Peturi, tá skriv varð handað floksformonnunum niðri í tinginum. Í verandi støðu skal Petur til Danmarkar mánadagin, og hesum mótmæla avvarðandi**

LÍTLI PETUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Søgan um lítla Petur við serligum tørvi er klassiska søgan um tann lítla, veika og verjuleysa borgaran, sum samfelagið ikki hevur pláss fyri.

Men hóast málið er meiri kompliserað enn so, er tað ein sannroynd, at lítli Petur skal skiljast frá sínum systkjum í heimliga umhvørvinum. Eftir mikið stríð í fleiri mánaðir skal lítli Petur í verandi støðu í flogfari mánadagin niður á døgnstovn í Karup kommunu, har pápi Petur bíðar.



*– Eg vænti einki, tí eg havi ikki longur álit á føroysku myndugleikunum, men vit hava altíð loyvið at vóna, sigur forkvinnan í MBD/DAMP, Bára Johansen, sum her sigur nøkur borgarlig orð við floksformenninar uttanfyri tingið, eftir at teir hava fingið mótmæli um lagnu lítla Peturs*

*Mynd: Maria Olsen*

### Døpur útlit

Seinnapartin hósdagin handaði Bára Johansen, forkvinna í MBD/DAMP-felagnum, floksformonnunum skriv uttanfyri tingið. Hetta er sama áheitan, sum varð handað myndugleikunum 11. juni, og tá høvdu 9430 føroyingar veitt sín stuðul við undirskriftum.

»Vísandi til omanfyri standandi heita vit staðiliga á flokkarnar á løgtingi og hvønn einstakan løgtingsmann um beinanvegin at játta neyðuga peningin til keyp av húsum og at bera so í bandi, at Petur ikki noyðist av landinum mánadagin, tí tað at skrykkja Petur upp við rót úr trygga sosiala umhvørvinum í Føroyum verður til óbótaligan skaða fyri bæði Petur og systrar hansara«. Eftir handanina í tinginum segði Bára Johansen, at nú er tað gjørt, sum stendur í teirra makt at broyta støðuna.

– Eg vænti einki, tí eg havi ikki longur álit á føroysku myndugleikunum, men vit hava altíð loyvið at vóna, og kanska eitt undur fer at henda, sigur Bára Johansen.

Forkvinnan í MBD/DAMP heldur, at gongdin í málinum hevur staðfest, at vit búgva í einum landi, sum ikki er fyri øll.

– Samfelagið hevur tikið sær av systrunum hjá Peturi, men ikki av honum sjálvum. Einki tilboð er til Petur, okkara skipan umfatar ikki børn við serligum tørvi, og løgfrøði og teori eru tikin framum vit og skil, sigur Bára Johansen.

**RESUMÉ**

Eftir at hava prátað við familju, myndugleikar, áhugafelag og ónevndan sakførara tykist hetta í stuttum vera kjarnin í málinum um lítla Petur:

1. Foreldramyndugleikin yvir Petur er í Karup kommunu, og tí er avgerðarrætturin í hesi kommunu og ikki í Føroyum.
2. Petur hevur sambært serfrøðingum brúk fyri viðgerðartilboði (døgnstovni), sum Tórshavnar býráð eisini hevur mælt til.
3. Eingin viðgerðarstovnur av slíkum slagi finst í Føroyum.
4. Tí hevur Karup kommuna saman við pápa lítla Petur gjørt av, at Petur skal niður.
5. UM EIN VIÐGERÐARSTOVNUR FYRI SLÍK BØRN VIÐ SERLIGUM TØRVI HEVÐI VERIÐ Í FØROYUM, HEVÐI PETUR HELST VERIÐ VERANDI.

Eyðun Jensen, Tórshavnar býráð:

# Vit hava hava gjørt okkara

**– Knúturin í málinum er, at Karup kommuna hevur avgerðarrætt yvir Peturi, tí har er foreldramyndugleikin , og so leingi pápin og kommunan vilja havað lítla Petur niður, kunnu vit einki gera, sigur Eyðun Jensen á sosialu deild í býráðnum**

LÍTLI PETUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Í øllum fjølmiðlameldrinum kring lítla Petur hevur sosiala deild í Tórshavnar býráð verið nevnd aftur og aftur. Sosiala deild er saman við almanna- og heilsumálaráðnum avvarðandi myndugleiki, og Eyðun Jensen formaður á deildini sigur, at alt er gjørt fyri at fáa Petur at vera verandi í Føroyum.

### Ongan avgerðarrætt

Knúturin í málinum er sambært Eyðuni Jensen, at Tórshavnar kommuna ikki hevur endaliga orðið í málinum um Petur.

– Karup kommuna hevur endaligan avgerðarrætt, tí har er foreldramyndugleikin yvir Peturi. Vit hava roynt at útseta avgerðina um at flyta Petur av landinum, til ein tøkur stovnur er í Føroyum, so Petur kann vera verandi, men avgerðin er tikin, og vit kunnu ikki gera meiri við málið, sigur formaðurin á sosialu deild. Eyðun Jensen ger greitt, at endamálið frá byrjan hevur verið at varðveita lítla Petur í Føroyum, men tá einki stovnspláss er til hann, samstundis sum pápin og Karup kommuna ikki vilja bíða, kann býráðið ikki gera meiri.

– Tað hevur verið langt av leið støðugt at ákæra sosialu deild, tí vit hava gjørt tað, vit kunnu, sigur Eyðun Jensen.

### Tilmælið

Avvarðandi hjá Peturi siga aðrastaðni á síðuni, at Karup kommuna bert hevur gjørt eftir tilmæli frá Tórshavnar kommunu, og at tað er orsøkin til, at Petur fer til Danmarkar mánadagin. Men hesum vísir Eyðun Jensen aftur.

– Vit bóru víðari tað tilmæli, vit fingu frá serfrøðingum, sum kannaðu Petur, og tað tilmælið var at fáa Petur á viðgerðarstovn. Eingin slíkur er tíverri í Føroyum, og tí er avgerðin tikin í Danmark um, at drongurin skal niður, greiðir formaðurin í sosialu deild frá.

Teirra møguleiki hevur verið at fáa donsku kommununa og pápan at bíða, til viðgerðarstovnur er tøkur í Føroyum, sum almanna- og heilsumálaráðið er í holt við at útvega, men sum sagt vildi kommunan við endaliga avgerðarrættinum ikki bíða.

### Einki fjalt

Omma Petur ákærir eisini býráðið fyri at hava fjalt upplýsingar, so avvarðandi ikki skuldu hava neyðugu stundirnar at mótmæla, men somuleiðis vísir Eyðun hesum aftur.

– Vit hava mótmælt og arbeitt fyri, at Petur kann vera verandi í Føroyum. Vit upplýstu avvarðandi beinanvegin um, at Karup kommuna vildi hava Petur niður, og tá endaliga úrslitið fyrilá í august, boðaðu vit beinanvegin frá, sigur Eyðun Jensen at enda.

# Býráðið sveik

**– 8. juli varð avgerð tikin um, at Petur skuldi til Danmarkar, og ikki fyrr enn 3. august fekk eg boðini, hóast eg áhaldandi spurdi meg fyri. Tórshavnar býráð hevur tilvitað fjalt hesar upplýsingar, so vit ikki skuldu hava stundir at mótmæla, sigur omma Petur, Gunnvør Poulsen**

LÍTLI PETUR
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*



*– Tað kennist serliga svárt, at hann skal av landinum, samstundis sum fleiri fosturfamiljur hava givið til kennar, at tær vilja taka sær av Peturi, sigur omma lítla Petur, Gunnvør Poulsen. Her er hon avmyndað hósdag seinnapart niðri í tinginum, beint eftir at ein seinasta áheitan er handað floksformonnunum*

*Mynd: Maria Olsen*

Síðani mamma lítla Petur fór, hava omma og abbi Petur, Gunnvør og Jóannes Poulsen, havt abbasonin, sum á ein øðrvísi hátt nærmast hevur fingið kultstatus í Føroyum. Gunnvør Poulsen sigur eins og Bára Johansen aðrastaðni á síðuni, at seinasta royndin nú verður gjørd, men hon metir tað ikki vera sannlíkt, at Petur verður verandi í Føroyum.

### Býráðið fjaldi upplýsingar

Gunnvør Poulsen finst harðliga at Tórshavnar býráð, og ákærurnar eru álvarsamar.

– Eg spurdi meg áhaldandi fyri á býráðnum, og tey lovaðu, at tey skuldu siga frá, um okkurt nýtt var at frætta. Hóast tað fjaldu tey upplýsingar fyri okkum frá 3. juli til 8. august, sigur Gunnvør Poulsen.

Hon greiðir frá, at henda dagin í juli var avgerð endaliga tikin um lítla Petur, men býráðið ringdi ikki til sakførara hennara fyrr enn 8. august.

– Fyri mær tykist hetta vera ein tilvitað ætlan, so vit skuldu hava so stutt skotbráð sum gjørligt at mótmæla. Sosiala nevnd í býráðnum fór aftur um rygg okkara við at fjala slíkar upplýsingar, sigur Gunnvør Poulsen.

### Tøkar fosturfamiljur

Gunnvør Poulsen greiðir frá, at fleiri fosturfamiljur í Føroyum hava givið til kennar, at tey fegin vilja taka sær av lítla Peturi, og Gunnvør hevur saman við avvarðandi verið glað fyri hesa vælvild og hesi tilboð.

– Men hetta hava myndugleikarnir heldur ikki loyvt okkum. Avgerðin er tikin um, at Petur skal til Danmarkar, og tað kennist serliga svárt, tá vit vita, at føroyskar familjur eru sinnaðar at taka sær av dreinginum, sigur Gunnvør Poulsen.

Hon sigur, at stríðið fyri at varðveita Petur í Føroyum hevur verið strævið, og tað tykist sambært Gunnvør ikki, sum arbeiðið hevur givið úrslit.

– Men til mánadagin vóna vit, at onkur kemur okkum til hjálpar, sigur Gunnvør Poulsen, omma Petur.